


***Nr. 13*** ***24. juni 2018*** ***78. árg.***

# Jesus fekk yndi til hansara

*Men Jesus hugdi upp á hann og*
*fekk yndi til hansara. Luk. 10,21.*

Hann fór syrgin burtur, og Jesus læt hann fara. Hví gjørdi hann tað? Hví bað hann hann ikki steðga á, so teir kundu tosa saman? Tí tann ríki unglingin ætlaði sær sín egna veg, og ongin kann ganga tveir vegir. Annaðhvørt gangi eg á Jesu vegi ella á mínum egna vegi. Ein millumvegur finst ikki.

Unglingin fór syrgin burtur. Hví? Kanska var hann misnøgdur við seg sjálvan. At tykja synd í sær sjálvum kann mangan síggjast sum uppreistur. Vit eru misnøgd, tí Jesus er so avgjørdur. Her standa vit og vilja trúgva, og so krevur Jesus tað órímiliga. Hann býður okkum ikki so frægt sum nýggjar tingingar, men letur okkum fara. Íðan, so fara vit.

Ja, kærleikin er mangan hjálparleysur; tað hava mong foreldur sannað. Kærleikin kann ofra alt, líka til ein sjálvur stendur berur eftir. Hann kann geva alt uttan at krevja nakað afturfyri. Men hann slakar ikki og ger eina avtalu, tí er hann hjálparleysur í hesum heimi.

Hví fór hann syrgin burtur? Hann hevði sæð gull glitra og skilt, at bara dárar kunnu nokta fyri, at hjá Kristi er alt ektað, og tann, sum ikki torir at vera trúgvur móti tí parti av sannleikanum, sum hann er sannførdur um, má fara syrgin burtur.

**Men vita skalt tú** - annaðhvørt tú fert tín egna veg, ella tú hoyrir til teirra, sum leingist og spyr - **at Jesu kærleiki ikki er**

**uppbrúktur.** Kærleiki hansara er beskeðin, og hann tekur sær av tí ringasta. Kærleiki hansara er kravmikil; tí hann vil eiga teg fult og heilt. Fert tú? Hvagar fert tú, um tú rýmir burtur frá tí einasta á foldum, sum hevur orð hins æviga lívs?

# Gev, meðan tú kanst

Nýggjur drongur var komin í skúlaflokkin; hann var úr fátækum heimi. Skógvarnir vóru slitnir og jakkin ov lítil. Teir stóru dreingirnir stuttleikaðu sær óført og kundu ikki bara sær at arga hann. Teir tóku húgvuna frá honum og blakaðu hana upp í loft, so hon endaði í einum runudíki.

Nú bar so á, at ein frúa kom at standa undir liðini á hesum dronginum, og hon segði: „Vita tit, børn, hesin drongurin er eitt Guds lamb."

Ein løgin kvirra legði seg yvir flokkin, og hon spurdi: „Halda tit, at Jesus verður glaður, tá ið tit arga ein av hansara smáu?"

Børnini vóru eitt sindur forvitin eftir at vita, hvør henda frúan var. Drongurin, ið helt seg inn til hennara, sigur: „Nú eri eg hvørki kaldur ella bangin."

Tá ið børnini dagin eftir komu í skúla, síggja tey, at fremmanda frúan er nýggja lærarinnan, ið koma skuldi. Børnini løgdu eisini til merkis, at fremmandi drongurin hevði fingið nýggjar skógvar og nýggj klæðir. Lærarinnan hevði keypt honum skógvarnar, og onnur høvdu so givið honum nýggj klæðir. Og hereftir varð hann virdur av hinum børnunum í flokkinum.

Ja, tað er so lætt at skumpa tað, ið stendur til at falla. Veitst tú, at øll menniskju, ið tú møtir, og sum tú sært, hava líka nógv brúk fyri kærleika sum tú? Ver ikki sparin við vinsomum orðum og eini hjálpandi hond. Tað eru so mong, sum hava tína hjálp fyri neyðini, so mong, sum bíða eftir einum vinsomum orði. Gev, meðan tú kanst!

*A.J.*

---

Men líka sum eingin gerst lukkuligur av at hava lukku sum sítt mál, gerst tú heldur ikki tað menniskja, Gud hevði hugsað sær, við altíð at hugsa um teg sjálvan. Tú blómar ikki við at royna at gerast nummar eitt. Blómandi menniskju eru til signingar fyri onnur, og tað eru tey í óvæntaðum og eyðmjúkum umstøðum.

*e.c.* ums.

# Troyst úr himli

Ein maður talaði í Meinigheitshúsinum. Upp í talu sína knýtti hann eina frásøgn um sorg og vón til teirra, har deyðin hevði vitjað:

Ein kona í Onglandi átti ein son. Tá ið drongurin var 4 ár, doyði hann av krabba. Mamman syrgdi hann so sáran, alt tyktist tómt og høpisleyst. So gingu trý ár; tann fyrsta apríl setti hon seg í bilin og koyrdi út á kirkjugarðin. Henda dagin hevði sonur hennara fylt sjey ár, um hann hevði verið á lívi. Hon græt og rópti hart í bilinum: „Vís mammu eitt tekin!“

Komin út á kirkjugarðin, setti hon seg á kantin á grøvini. Tá hendi nakað. Ein smáfuglur, ein bringureyði tey kalla, setti seg á gravsteinin. So fleyg hann yvir og setti seg á fremstafingur á mammuni. Har sat hann eina góða løtu og hugdi beint inn í eyguni á henni. Síðani setti hann seg á øksl hennara og pikkaði spakuliga tvær ferðir niður á økslina, og so fleyg hann avstað aftur.

Mamman fór á føtur og var uggað, nú hon koyrdi til hús aftur.

*E. Campbell.*

# Ongin er hansara líki

Um meg sjálvan skal eg siga, at eg eri eitt sermerkt, tíðarbarn, sum ivasjúka og mistrúgv níva illa, og eg verði óivað ikki øðrvísi. Eg eri farin ígjøgnum ivans stóra bræðingarovn.

Tó hevur Gud viðhvørt givið mær løtur í lívinum, tá ið fullkomin friður var á mær, og tílíkar løtur havi eg orðað trúarjáttan mína. Hon er einføld og ljóðar soleiðis:

***„Eg trúgvi, at onki er vakrari, onki djúpari, onki so dragandi, onki so satt, so víst, so treystligt, so fullkomið sum Jesus Kristus.“***

Eg sigi við meg sjálvan,at hansara líki er heldur ikki til. Kundi onkur prógvað fyri mær, at sannleikin um lív okkara er ikki hjá Kristi, so vildi eg heldur verið hjá Kristi enn hjá sannleikanum.

*Fjodor Dostojevski / t.* týddi.

# Skriftáskoðan

Gamli Óli sat og las í Bíbliuni, tá ið ein frælslyntur gudfrøðingar kom at vitja hann.

„Gud er máttmikil," segði Óli, „hann leiddi ísraelsfólk turrskøtt gjøgnum havið."

„Tað var bara tríati cm djúpt, so hatta var onki undur," segði gudfrøðingurin.

So las gamli Óli aftur eina løtu. So segði hann: „Ja, Gud er sanniliga máttmikil."

„Hvat sigur tú nú?" spurdi gudfrøðingurin.

Gamli Óli svaraði: „Hugsa tær, Gud druknaði allan tann egyptiskaði herin í 30 cm djúpum havi!"

*t.* týddi.

# Hon fekk eini ráð

Ein ungdómur fortelur um eini ráð, sum hon fekk:
„Ein morgunin tendraði eg sjónvarpið, og har sá eg, at sent varð frá eini gudstænastu. Eg var 14 ár, so eg visti ikki so nógv um kristindómin. Men hann í sjónvarpinum segði okkurt um, at Gud ella Jesus fyrigevur okkum syndir okkara. So latið okkum biðja til Harran, so hann fyrigevur okkum syndir okkara og misbrot," segði hann. So setti eg meg niður og fór at biðja og fyrigeva. Og tá ið eg var liðug, kendi eg ein lætta innan í mær. Tann ringa samvitskan var burturi, eg var vorðin frelst og hevði fingið fyrigeving. So líka síðan ta ferðina havi eg trúð á Gud og Jesus Kristus." Soleiðis skrivar ein 18 ára gomul genta.

Hon sigur við persóligum einføldum orðum, hvussu Gud kann brúka eina áheitan í sjónvarpinum. Ein, sum bar orðið fram, kom við einum ráðum, og tey blivu fylgd.

*Eg Harranum lovi, ið ráð mær gav.* (Sálmur 16,7).

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 14* *8. juli 2018* *78. árg.*

# Hvør er ætlanin við øllum?

Heimurin er av lagi! Men Gud hevur ætlanir um frið og vónríka framtíð fyri heimin. Um eg lesi tíðindini, um hvat ið hendir úti í heiminum í dag, síggi eg skjótt, at tey ringu tíðindini fylla nógv. Næmingar verða skotnir í skúlum í USA, Norður-Korea hóttir við kjarnorku-bumbum, ísurin bráðnar við pólarnar, og fólk í hópatali flýggja hvønn einasta dag undan ófriði.

Koma vit so her á leið í Norður-Europa, so er her eisini ymiskt, sum er farið av lagi: bardagi millum brotsmannalið, plastdálking, dálkað drekkivatn og politikarar, sum hunddálka hvørannan. Kortini er vón fyri framman, hóast eitt fyri og annað eftir sær út til at fara fyri skeytið.

Men lesur tú Bíbliuna, sært tú, at Gud hevur góðar ætlanir fyri framtíðina hjá heiminum.

Hjá Jeremia lesa vit: „Tí eg veit, hvørjar ætlanir eg havi í hyggju við tykkum, sigur Harrin, ætlanir um frið og ikki um ógævu, til tess at veita tykkum vónríka framtíð.“

Hesi orðini segði Gud við ísraelsfólk, sum um ta mundið livdi sum flóttafólk í øðrum landi. Men tey eru eisini ætlað okkum, sum nú liva.

Tað er ikki Guds ætlan, at menniskju skulu liva og líða í einum heimi við kríggi og vanlukkum. At vit kortini gera tað, er ein fylgja av, at menniskjan hevur svikið Gud og vent sær burtur frá honum. Men ynski Guds er at vera saman við okkum.

Tí gjørdi Gud ein plan, **PLAN JESUS.** Jesus - Guds egni sonur - hevur aldri gjørt nakað skeivt; men kortini læt hann seg føða sum menniskja og tók niðurløgini hjá allari mannaættini á seg. Ikki er hann líkasælur, um menniskju falla í synd, men vit eiga aldri at vera bangin fyri at viðganga tað fyri honum. Tá ið vit gera tað, svarar hann: „Tað havi eg borið revsingina fyri, eg fyrigevi tær.“

***Jesus mín trúfasti Harri og kongur,***
***øllum tú vanst mær, eg taki ímót!***
***Ei vil eg tærast av ivanum longur;***
***tú hevur lovað at leiða mín fót.***

# Hvussu skilja vit Guds Orð?

Guds Orð verður ofta brúkt soleiðis, at tað, sum er satt fyri teg, ikki neyðturviliga er satt fyri meg. Vit avgera sjálvi út frá okkara skili og lívsáskoðan, hvat ið er rætt, og vit velja gleðiliga tað frá, sum ikki hóvar okkum.

Tað er møguleiki fyri, at vit hevja okkum sjálvi upp til at vera fasittið, úrslitið, og snara og benda Guds Orð fyri at fáa tað at passa inn í egnar hugsanir. Vegleiðingin hjá kirkjuni verður veik og víkjandi, tí fatanin gongur í allar møguligar ættir. Um vegleiðingin verður ótýðilig, so skapar hetta bara hurlivasa, split og ørkymlan. Har tvey kristin møtast, eru brádliga tríggjar hugsanir.

**„Um lúðurin gevur ógreidligt ljóð, hvør man tá búgva seg til bardaga?“** (1. Kor.14,8) At savna hermenn um tað týdningarmikla og góða málið hjá kirkjuni dettur niðurfyri, tí fólk renna í allar møguligar ættar. Ein spjadd og ráðaleys kirkja missir trúvirði. Hví skulu vit lurta eftir henni? Hon veit ikki so frægt sum, hvat hon sjálv meinar. Tað verður høpisleyst, tí tað eru so nógvar ósam-svarandi meiningar, sum útjavna hvør aðra. Í 2000 ár hevur kirkjan boðað „syndernes forladelse – ikke syndernes tilladelse.“

Einaferð segði Jesus við Pætur: „Hold og blóð hevur ikki opinberað tær tað, men faðir mín, sum er í himlunum.“ (Matt.16,17).

*E. Campbell* umsetti

# Hvør er Jesus?

Tað eru mangar hugsanir um, hvør Jesus er. Í samtíð síni varð Jesus lagdur undir at koma við ógreiðum svarum. Men Jesus helt fast við svar síni og at ongum nýttist at vera í iva.

Mótvegis viti og skili stendur Jesus sum ein gáta og ein mótsøgn. Á annan bógvin er tað greitt, at Jesus er heimsins vón og frelsari. Tað vísti hann, tá ið hann grøddi tey sjúku, vakti upp deyð og talaði orð, sum góvu vón.

Tað var greitt, at Jesus kom úr einum øðrum heimi. Á ein hátt kundi Jesus stíga fram sum bæði veikur og máttleysur og líktist als ikki tí væntaða Messias-konginum.

Tann hugsanin seyraði ígjøgnum alla ta kristnu trúnna. Á annan bógvin er tað týðiligt, at við Jesusi er eitt nýtt ríki komið inn í gamla heimin. Á hin bógvin tykist nógv framvegis vera við tað gamla. Mótsøgnin kemst av, at her er bæði eitt **'longu'** og eitt **'ikki enn'**. Við Jesusi er Guds ríki longu her sum ein blóma, sum stendur í knubba. Enn hevur blóman ikki heilt breitt seg út. Tað hendir ikki, fyrr enn Jesus kemur sum sigursharri og ger alt nýtt.

# Ljósið hinumegin ánna

Í uppvøkstrinum, sigur ein norðmaður frá, fylgdist eg ofta við pápa og mammu til myllaran at fáa korn malið. Ikki var langt at ganga stytsta veg, men heldur trupult. Vit skuldu eisini fara tvørtur um eina á við einum lítlum báti. Og tað var vandamikið, tí áin rann stríð. Eitt sindur niðari var ein fossur.

Ein dagin fóru pápi og eg til mylluna. Vit vistu, at dagurin var stuttur. Á vegnum sóu vit við lykt, hvar vit vóru. Men tá ið vit skuldu fara um ánna, máttu vit sløkkja okkara ljós, tí nú villleiddi ljósið í staðin fyri at vegleiða okkum úti á tí stríða streyminum.

Men pápi hevði skipað soleiðis fyri, at mamma skuldi standa á lendingini hinumegin við einari tendraðari lykt. Ljósið úr lyktini hjá mammu, har hús okkara stóðu, vegleiddi okkum, og vit komu í øllum góðum yvir um ánna.

Hesin tilburður hevur seinni í lívinum mangan talað til mín. Gud hevur tendrað sítt ljós í himmalska heiminum hinumegin ánna, og hetta er ljósið, sum kann føra okkum til himmalsins signaða heim.

Gud er komin til okkara gjøgnum Jesus Kristus, sum er ljós heimsins.

*t.* týddi.

---

# Hvat heldur tær aftur?

*„Hálovaður Harrin veri, ið unnar sínum tænara vælferð!"*
*Sálm. 35,27.*

Gud gav Ábrahami tvey lyfti. Fyrst lovaði hann at vælsigna hann ríkiliga. Síðani lovaði hann at gera hann til stóra signing fyri onnur. 1. Mós. 12,2.

Og so gekk tað!

Sálomon skrivar: „... alt ført tú fyri pengar." Hvat meinti hann? Pengar byggja skúlar, kirkjur og sjúkrahús. Teir beina fyri fátækradømi og analfabetismu. Teir fíggja gransking, sum lekir lívshættisligar sjúkur. Men summi okkara eru so áhugað av teimum gullløgdu gøtunum í Himli, at vit ikki longur geva okkum far um tær jarðisku gøturnar, sum eru fullar av líðingum og óuppfyltum tørvum.

Tú mást skilja hetta: Gud fer at løna tær eftir, hvussu tú tænir øðrum menniskjum. Og kongurin skal svara og siga við tey: „Sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær." Matt. 25,40.

TAÐ átti at verið tann størsta grundin hjá tær at farið til verka.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74